








W W W . S O S I A L U R I N . F O

# Nýggj kollveltandi sólviðgerð

**Ein húðarlit, ið sær út til at verða komin av nøkrum døgum sunnanfyri. Eingin vandi fyri húðkrabba, rukkum ella pigmentbroytingum. Hetta er eitt nýtt slag av sjálvbrúnara, sum verður nýtt av teimum fremstu innan vakurleikarøkt í USA og London. Og nú eisini í Havn. Liturin verður sproytaður uppá húðina í einum tunnum, men heildekkandi lagi**

VAKURLEIKARØKT
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin*

Síðani húðkreftin av álvara fór at gera um seg, hevur leingi verið leitað eftir einum útskiftara til háfjalssólirnar. Nýggjasti spírin innan hetta økið, er júst komin til Føroya. SunSpa Airbrush er navnið. Hetta er ein vøra, ið virkar sum sjálvbrúnari, t.v.s., at evni fer ikki ínn í húðina, men litar bert uttasta húðarlagið. Munurin á hesum og sjálvbrúnara er, at hetta ikki er krem, men spray. Hetta er heldur ikki nakað tú gert í eini handavending har heima, tí viðgerðin verður gjørd av kostmetologum úti á vakurleikaklinikkum.

Viðgerðin tekur ein hálvan tíma. Tú stendur uppi ímeðan kostmetologurin sprayar. Hon nýtir eitt serligt tól, sum er knýtt at einum kompressara. Tá allur kroppurin er dekkaður, fært tú eina baðikápu at lata teg í, og eini fimm minuttir seinni, tá sprayið er tornað, kanst tú lata teg í klæðini aftur.

Maria Vilhelmsen, sum er útbúgvin kostmetologur, og sum hevur hetta tilboðið á síni klinikk í Havn, sigur, at fyrimunurin við SunSpa er, at liturin sær út sum hann er komin av veruligu sólini, tí hann lagar seg til náturliga húðarlitin. Tú verður ikki reyður og snerktur, sum í solarium, men beinleiðis brúnur.


*Maria Vilhelmsen er fyrsti kosmetologur í Føroyum, sum er farin undir SunSpa Airbrush sólviðgerð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Ikki brent, ikki ójavnt

Av tí, at tað er ein kønur kostmetologur, ið hevur viðgerðina um hendi, er eingin vandi at fáa typisku sjálvbrúnaraplettirnar og ójavnleikan heldur. Maria sigur tó, at húðin skal vera grundiga rein tá viðgerin fer fram, so hon tilmælir kundunum at fara í bað beint áðrenn viðgerðina og exfoliera húðina væl. Eftir viðgerðina skulu helst ganga 12 tímar áðrenn farið verður í bað aftur. Hon sigur, at SunSpa hevur ein frískan anga, ikki hin eyðkenda tunga solariums- og sjálvbrúnaraangan, so tað er eingin trupulleiki at fara beinleiðis í ball aftaná viðgerðina.

Sólbrendi liturin heldur í eini 5 til 10 dagar. Tað avhongur av húðini hjá tí einstaka. Maria sigur, at fyrstu ferð tú kemur inn at fáa viðgerðina, er best at koma aftur innan eina viku og fáa næstu viðgerðina. Eftir hetta kann tíðin leingjast ímillum viðgerðinar.

Hon hevur eisini eitt annað slag av airbrush sjálvbrúnara, SunGlitter, sum hevur glimmur í. Møguleiki er at fáa gull ella bronsu glimmur um allan kroppin saman við sólbrenda litinum. Hetta verður kanska serliga ætlað yngri konufólki, áðrenn farið verður í fín ball. Maria sigur, at glimmurið vaskast av fyrstu ferð tú fert í brúsu, men at sólbrendi liturin heldur sum vanligt allíkavæl.

Maria Vilhelmsen hevur longu havt fyrstu kundarnar, og teir hava latið ótrúliga væl at SunSpa airbrush. Viðgerðin hevur eisini fingið topp karakterir í alskyns damubløðum og testum kring allan heim.

Viðgerðin kostar 260 kr. og um tú kemur aftur aðru ferð innan fimm dagar, kostar onnur viðgerð 225 kr.

### Nokk at gera

Maria sigur seg annars hava úr at gera.

– Tá eg lat vakurleikaklinikk upp á fyrsta sinni, var tað ógvuliga róligt arbeiði. Men nú eru føroysku konufólkini – og mannfólkini eisini, blivin meira tilvitað um kroppsrøkt. Tað eru uml 3-4 vikur bíðitíð at sleppa framat hjá mær, og eg arbeiði frá kl 9 til einaferð um 18-19 tíðina, sigur hon. Hon greiðir frá, at tað mest av øllum er andlitsviðgerðir, ið eru á skránni hjá henni, men at hon annars ger alt vanligt kostmetologarbeiði, t.d. negl, hártøku og kropsviðgerðir. Eisini hevur hon nógvar brúðrar at pynta.

– Tað eru so nógv ting, sum okkum ikki nýtist at góðtaka blankt longur, t.d. óynsktan hárvøkstur, acne og veikar negl. Hetta kann alt ornast nú, og tað hava fólk funnið útav, sigur Maria.

Og nú nýtist okkum heldur ikki blankt at finna okkum í at fáa krabba og rukkur, bert tí vit ynskja okkum ein summarsligari húðarlit.









